# ALMANNASTOVAN

## Á Almannastovuni eru tvey málsviðgerastørv at seta

À økisdeildini í Havn er eitt starv sum málsviðgeri at seta skjótast gjørligt.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá økisdeildini er at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur viðv. almannaspurningum; at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuna og í serligum førum vísa áheitanum til serdeildirnar á stovninum.

Á deildini arbeiða 8 sosialráðgevar, 6 málsviðgerar og deildarleiðari.

**Arbeiðsuppgávurnar** hjá málsviðgerunum eru hesar:
- taka ímóti viðskiftafólki og taka telefonina
- skráseta post
- útrokna og ávísa játtaðar veitingar
- fyrireika mál til avgreiðslu
- skriva brøv
- loysa aðrar fyrifallandi uppgávur

**Førleikakrøv:**
- skrivstovuútbúgving, merkonom, HH ella onnur viðkomandi útbúgving
- góður kunnleiki til KT
- góður málsligur førleiki
- viðkomandi arbeiðsroyndir

**Setanar- og lønarviðurskifti**
eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðvør Mortensen, deildarleiðara á telefon 353570.

---

Á tænastudeildini á høvuðsskrivstovuni í Havn er eitt starv sum málsviðgeri í 3/4 tíð at seta sum skjótast.

Arbeiðsøkið hjá deildini er í høvuðsheitum at skráseta allan innkomnan post.

Á deildini arbeiða 2 $^3/_4$ málsviðgerar, fulltrúi og deildarleiðari.

**Arbeiðsuppgávur:**
- stovna mál
- skráseta innkomnan post
- klárgera mál
- taka telefon
- taka ímóti viðskiftafólki
- ymiskt fyrifallandi arbeiði á deildini

**Førleikakrøv:**
- skrivstovuútbúgving, HH, onnur fyrisitingarlig útbúgving ella hollar royndir innan skrivstovuøkið
- royndir inna almenna fyrisiting
- góður kunnleiki til KT
- viðkomandi royndir.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Anne Djurhuus, deildarleiðara á tlf. 353510.

**Umsóknir:**
Sendið umsókn við avirit av prógvum o.ø. til:

**Almannastovuna**
Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096
110 Tórshavn

Vinarliga merkið brævbjálvan: Tænastudeildin ella Økisdeildin.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 23. desember.

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Snarskivan

Snarskivan er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu

Deildin er bindiliðið millum borgaran og tær tríggjar fyrisitingarnar: Miðfyrisitingina, Teknisku fyrisitingina og Trivnaðarfyrisitingina.

Arbeiðsøkið, ið Snarskivan røkir, er tænasta í breiðari merking til borgara og starvsfólk.

Snarskivan heldur til í snotiligum hølum í miðbýnum í Havn. Avgreiðslan er saman við postverkinum í gamla posthúsinum

- leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

## Fjølmiðlastarvsfólk til Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir eftir fjølmiðlastarvsfólki. Starvið er nýtt, og verður viðkomandi partur av toymi, ið skal menna samskiftið í Tórshavnar kommunu, har stórur dentur verður lagdur á eina vælvirkandi kunning til borgaran.

**Uppgávur**
Uppgávurnar hjá fjølmiðlastarvsfólkinum vera m.a.:
- Skipa kunningarpolitikkin
- Ritstjórna kunningarrit
- Tíðindir frá kommununi
- Innanhýsis tíðindir
- Dagføra tíðindir á heimaneti og heimasíðu
- Dagføra tíðindir á kunningartalvum.

**Førleikakrøv**
Sum umsøkjari skalt tú hava lokið fjølmiðlaútbúgving og hava royndir á økinum. Tú ert eisini lættur at samstarva við, ágrýtin og eldhugaður.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett frá 1. mars 2006, ella sambært avtalu. Starvið er flokkað í 6. lønarflokki sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, ella Mourits M. Joensen, deildarleiðara, á tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við próvskjølum, viðmælum og upplýsing um arbeiðsroyndir, skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi hósdagin 5. januar 2006 kl. 16.00. Viðmerkið umsóknina "Fjølmiðlastarvsfólk".

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Miðfyristingin

Í miðfyrisitingini eru hesar deildir:

Roknskapardeildin, herundir bókhald, kassi og líkningareftirlit Snarskiva, KT-deild, Starvsfólka- og lønardeild Skattakærufyrisiting

Vinnusamskiparin fer at starvast í ráðhúsinum har m.a. borgarstjórin og kommunustjórin húsast.

Í miðfyrisitingini starvast í løtuni 45 fólk, í ymiskum hølum í miðbýnum.

- leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

## Vinnusamskipari til Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommunu søkir eftir vinnusamskipara. Vinnusamskiparin skal lýsa vinnulívið í kommununi sum heild og útgreina hvørji átøk, Tórshavnar kommuna kann gera fyri at menna vinnuna í kommununi og skapa betri karmar. Starvið er nýtt, og viðkomandi verður tí við til at laga starvið til.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.**
- At lýsa vinnuna í Tórshavnar kommunu og meta um, hvørji átøk kommunan kann gera til tess at menna vinnuna sum heild.
- Útgreina hvat Tórshavnar kommuna kann gera fyri at menna ferðavinnuna í kommununi.
- At orða vinnustrategi og handlingsætlanir fyri Tórshavnar kommunu.
- Vera við til at lýsa og kunna um tær tænastur, sum Tórshavnar kommuna kann bjóða vinnuni.
- Ráðgeva vinnuni um hvørjir møguleikar eru í Tórshavnar kommunu.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum, at tú dugir væl at samskifta bæði munnliga og skrivliga á føroyskum og enskum, er framsíggin, framsøkin og fær úrslit. Útbúgvingarstøðið er ikki avgerandi, men telur við í heildarmyndini.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sum skjótast. Starvið verður sett sambært viðkomandi sáttmála og er verkætlanarsett fyri tvey ár (2006-2007).

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, á tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 5. januar 2006 kl. 16.00. Viðmerkið umsóknina "Vinnusamskipari".